## 7. TJÚGU NULL ÁTTA

Orð: Signar á Reynatrøð   Sangur: Bárður á Lakjuni
Lag og lagt til rættis: Bárður á Lakjuni,
Jógvan Símun Sevdal og Eiler Hansen

Saman vit stóðu í tjúgu null átta
Gøta og Leirvík tað her vilja vátta
Søga og skjøldur várt merki skal vera
Víkingur – navnið vit bera

Ljósablátt og svart er flott
Stórt og smátt er ørt og gott
Víkingur er besta lið
Og vit vinna fleiri stig

Viljan at vinna vit vísa í verki
Vakurt tá bleiktrar várt Víkingamerki
Stríðast og skjóta so bóltin í málið
Orkuna eiga og viljan av stáli

Ljósablátt og svart er flott...

Hugin at spæla hjá vaksnum og børnum
Vilja vit kveikja vár framtíðarstjørnum
Við teimum evnum úr Skaparans hondum
Víkingur ferðast í oyggjum og londum